## Góð fundarhøli í Keypmannahavn

Vit hava gott, nýtt fundarrúm 18 m2 til 4 – 6 fólk. Har er fundarborð, ADSL samband, telda og printari. Væl egnað til fundir bæði hjá privatum og almennum stovnum og feløgum.

Eisini hava vit stovu á 1. hædd 80 m2 til fundir og skeiðvirksemi. 22 – 30 fólk sita væl.
Í stovuni eru hentleikar sum TV, video, fløguspælari, projektørur, uppvørpa o.a.

Í Stórustovu 180 m2 er pláss til uppaftur fleiri fólk bæði til fundir og matnáðir.

Til ber at fáa kaffi og ábit til fundirnar.

Føroyahúsið er bert 10 min. frá Ráðhúsplássinum og 6 min. frá Høvuðsbanagarðinum og Vesterport. Fleiri bussar steðga nærhendis. Flestu hotellini liggja her á leið: Hebron, Ansgar, First Hotel, Scandic, Webers, Guldsmeden o.m.o.

Hølini kunna leigast til stuttar fundir, dagfundir og skeiðvirksemi. Lagaligir prísir. Áhugað eru væl komin at venda sær til leiðaran.

**Føroyahúsið**
Vesterbrogade 17A · 1620 København V
www.faroehouse.dk · postur@faroehouse.dk
Tlf. 33231587 · 20167274



## Til sølu




**Mini cooper, einasti av sínum slag í Føroyum.**

**Árgangur 2001,**
**hevur einans koyrt 25000 km.**

**Er sera væl hildin og er í góðum standi.**

**- Tlf. 517733 -**


**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*
*Sambýlið á Bárðarfløtti · FO-900 Vágur*
*Tlf. 374074 · T-postur: sambard@serforsorg.fo*

# Leiðari til Sambýlið á Bárðafløtti, Vágur

Undir Almanna-og Heilsumálaráðnum og stovnum undir tí, við tænastu fyribils á Sambýlinum á Bárðafløtti í Vági, er eitt starv sum leiðari á sambýlinum, leyst at søkja til setan 01. januar 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Sambýlið**
Sambýlið á Bárðafløtti er heim fyri fólk við serligum tørvi, umfatandi menningartarn og sálarsjúku. Á sambýlinum búgva í løtuni 5 fólk.

Sambýlið er karmur um heimalívið hjá húsfólkunum. Tey hava øll egna inntøku (pensión) og gjalda húsaleigu og allar vanligar húsarhaldsútreiðslur sjálvi.

Uppgávan hjá starvsfólkunum er at veita húsfólkunum stuðul og hjálp í teimum viðurskiftum í gerandisdegnum, sum tey, ikki megna at taka sær av sjálvi. Hetta gjalda húsfólkini ikki fyri.

Á sambýlinum arbeiða tilsamans 8 fólk. Umframt leiðaran eru 4 tænastumannasettir pedagogar og 3 hjálparfólk.

Sambýlið á Bárðafløtti hevur í ár eina játtan uppá slakar 2,2 mió kr.

**Starvið**
Leiðarin á sambýlinum hevur ábyrgdina fyri dagliga rakstrinum á stovninum. Hetta umfatar fakliga, fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd.

Lagt verður upp til, at leiðarin skipar sítt starv soleiðis, at hann/hon ikki er við í vaktarskipanini fyri stovnin.

Leiðarin á sambýlinum vísir til leiðaran fyri Serstovnadeildini, sum er deild undir Heimarøktini og Serforsorgini.

**Um leiðaran**
Tú skalt hava eina viðkomandi útbúgving innan sosialpedagogik og/ella –psykiatri og fakligan kunnleika til starvsøkið. Vit vænta av tær, at tú hevur hug og hegni til at leiða, og at tú, við tínum leiðsluhátti, megnar at skapa trivnað og menning í starvsfólkabólkinum og á sambýlinum sum heild. Vit vænta at tú hevur ávísan førleika innan roknskaparhald og at tú hevur hug og áræði at leggja afturat tíni vitan, tað sum krevst, fyri at kunna røkja leiðarastarvið til fulnar. Harumframt vænta vit, at tú hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, og at tú hevur evni og vilja til at samstarva við starvsfelagar og leiðslu á øllum økjum. Eisini vænta vit at tú ert sjónlig/ur í tínum leiðarastarvi og at tú dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum.

**Um okkum**
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv í einum fakliga krevjandi umhvørvi. Harumframt bjóða vit tær eitt starv, har tú sleppur at taka lut í framtíðar menningini av serstovnaøkinum í tøttum samstarvi við starvsfelagar tínar á øðrum stovnum og leiðsluna fyri Serstovnadeildini. Sum leiðari verður tú partur av einum leiðarabólki, sum er saman umleið 10 ferðir um árið. Harumframt fært tú tilboð um at vera partur av einum supervisiónsbólki, har møguleiki er fyri at fáa stuðul og íblástur frá øðrum leiðarum undir Serstovnadeildini.

**Setan og løn**
Starvið er í løtuni flokkað sum tænastumannastarv og verður lønt eftir avtalu ímillum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag á lønarstigunum 39, 41 og 43. Um komandi leiðarin ikki er pedagogur, verða lønar- og setanartreytirnar sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, flokkað á sama støði, sum tænastumannastarvið.

**Umsókn**
Vilt tú vita meira um starvið kanst tú venda sær til Jóanes N. Dalsgaard deildarleiðara á tlf. 304020.

**Freistin at søkja starvið er mándagin 19.12.2005.**

Umsóknir við próvskjølum, viðmælum og CV skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Serstovnadeildin
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

*Heimarøktin og Serforsorgin er stovnur undir Almanna- og Heilsumálaráðnum. Undir Heimarøktini og Serforsorgini eru 5 deildir við tilsamans uml 1300 200 fólk í 32 eindum, skipaðar í starvsfólkum og eini samlaðari játtan uppá uml 400 mió kr. Á stovnum undir Serstovnadeildini starvast uml tilsamans 23 rakstrarstøð, ið hvørt hevur sína leiðslu. Serstovnadeildin umsitur eina samlaða játtan uppá slakar 100 mió kr.*


**Vit skifta og avbalansera**

DEKK-Z VERKSTAÐUR



**LANDSINS BÍLIGASTA DEKK**
**Vit geva óbindandi tilboð**

Bestu dygd frá
DEKK-Z VERKSTAÐUR
Eiði · Tel 423 290 · Fax 423 291



**GSM telefonir &**

**GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar**

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 314414 · Fax 318045
storno@post.olivant.fo



**Nýggjar TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480